# Eg leiti enn

**Kjell Nupin er millum kendastu myndlistafólk í Noreg og hevur verið tað frá ungum árum. Hann ásannar, at stóri eftirspurningurin kann gera tað trupult at halda høvdið kalt, men tó er hann ein listamaður, sum hevur verið við ymsar støðir á listaleiðini, men sum tó veit hvat hann vil. Í hesum døgum sýnir hann fram í Listaskálnum**



*- Sjálvsálitið er júst ein umvend pyramida mótvegis vitinum og skilinum, tá ein er ungur, sigur Nupin*

LISTASTEVNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Kjell Nupin er ein myndlistamaður, ið hevur ein forkærleika fyri málningalistini, men sum annars nýtir ymsa tøkni og sum dugir síni ting. Hann hevur júst myndprýtt eina kirkju í Svøríki við glaslist og tað er fyrstuferð hann roynir tað.

### Stilli

Nupin gjørdi á ungum árum av at gerast málari og gjørdist eisini á ungum árum kendur og viðurkendur.

– Eg royni at fáa eitt framhald í málningarnar, stilli og eina djúpt, men eg royni at tálma myndevnunum. Eg haldi frávera av lívi, longsul og tað at vera á ferð, meint í fleiri týdningum, lýsir mína list, sigur Nupin, sum hevur fingið ein lit nevndan eftir sær, nevniliga nupinblátt.

Í dag er tað náttúran, skógurin ið hugtekur, sigur Nupin, sum á yngri árum m.a. málaði myndir við politiskum dámi og heitum. Hann sigur seg ikki kenna náttúruna betri enn onnur, men málningar hansara eru heldur ikki staðarbundnir, men hann málar ofta sama myndevni fleiri ferðir.

– Eg havi onkutíð nýtt hesi sentimentalu og melankolsku hugtøkini sum heiti á mínum málningum, ofta skemtandi ella sigandi, tí tað hevur havt øvugtan týdning, sigur Nupin, sum enn fegnast um at fara á verkstaðið og til arbeiðis.

### Leitar

Nupin er enn leitandi, hóast mong ár í fremstu røð.

Spurdur, um tað at gerast kendur á ungum árum ikki hevur verið eitt haft um beinið, sigur Nupin, at tíbetur eigur ungdómurin mót at halda fram.

– Og sjálvsálitið er júst ein umvend pyramida mótvegis vitinum og skilinum, tá ein er ungur, sigur Nupin, sum tó viðurkennir, at fíggjarliga merkti tað at vera kendur, at hann kundi savna seg um listina, og ikki um at fáa pening til vega til næstu oljurokningarnar.

Men enn í dag er til tíðir ringt at halda høvdið kalt, tá eftirspurnigurin er stórur, viðgongur Nupin.

Á Listastevnuni sýnir hann fram í listaskálanum og sýningin helldur á til 2. oktober.

## UM NUPIN

Kjell Nupen er føddur í Kristiansand í 1955 og gjørdi av longu sum 13 ára gamal at verða listamálari. Hann er útbúgvin á Statens Kunstmuseum í Oslo og á Staatliche Kunstakademie í Düsseldorf. Hann fekk sum ungur sítt gjøgnumbrot sum listamálari og grafikari og hevur í mong ár verið ein eyðkendur persónur í norskari samtíðarlist. Tann fjølbroytti listamaðurin hevur havt framsýningar í nógvum londum. Longu sum 20 ára gamal keyptu fleiri listasøvn og aðrir stovnar verk hansara. Harumframt hevur hann gjørt fleiri skreytmyndir.

Fyri Nupen eins og fyri listaheiminum vóru 1970-árini nógv ávirkað av hugmyndafrøði og politikki. Nógvar politiskar og mentanarligar kollveltingar fóru fram, og tað gekk oftani harðliga fyri seg. Nupen kom í tætt samband við politiseraða listaumhvørvið í Týsklandi, og var hetta nakað, ið eyðkendi myndir hansara, ið vístu á harðskap og kúgan. Hann gekk ímóti tátíðarfasismuni, og fleiri av politisku verkum hansara vísa á íblástur úr fjølmiðlaheiminum. Nevnast kunnu m.a. Situasjon, Stille betraktning, Denkmal, Fargelagt idyll og Stille natt, hellige natt. Nupen lat í stóran mun speisemi ráða yvir myndunum. T.d. er myndevnið í Fargelagt idyll flóttafólk undir Vietnamkrígnum, Denkmal (Minnisvarðin) ímyndar eitt bumbuflogfar, og Stille natt, hellige natt er tikið úr týska jólasálminum við sama navni, men lýsir í hesum føri grovan harðskap og ikki friðsæla vón, sum heiti annars bendir á. Grafiska listin var eisini týdningarmikil í 1970-árunum, ikki minst tí listamaðurin hevði ein politiskan boðskap. Kjell Nupen var meistari í grafikki, og hann fekk heiðursløn fyri grafisku list sína á altjóða grafikkstevnuni í 1981 í Baden-Baden.

Marjus Dam um javnstøðunevndina:

# -Setið eitt mannfólk í formanssessin

**Sambandstingmaðurin úr Vágum, Marjus Dam, heldur tíðin er búgving til, at eitt mannfólk verður sett í formanssessin í Javnstøðunevndini**

JAVNSTØÐUNEVNDIN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



– Javnstøðuarbeiðið skal ikki gerast til kvinnupolitikk. Vilja vit taka javnstøðuna í álvara, eiga bæði kynini at sleppa framat, heldur tingmaður Sambandsfloksins, Marjus Dam.

Vágatingmaðurin mælti undir umrøðuni av løgmansrøðuni týsdagin til, at eitt mannfólk verður sett í formanssessin í Javnstøðunevndini. Herfyri segði forkvinnan í Javnstøðunevndini, Annika Wardum Joensen, seg úr sessinum sum formaður í Javnstøðunevndini, og enn er eingin komin í hennara stað.

– Higartil hevur aðalhugsjónin í Javnstøðunevndini verið, at kvinnur eru við skerdan lut. Uppgávan hjá einum formanni er at arbeiða fyri javnstøðu fyri bæði kynini og ikki bara hjá kvinnunum. Eg haldi tað kundi verið gott fyri nevndina um bæði kynini sleppa at ráða, heldur Marjus Dam.

Sambandstingmaðurin vísir á, at Javnstøðunevndin hevur ikki í nóg stóran arbeitt fyri bæði kynini. Hann nevnir málið um foreldrarættin.

– Er stríð um foreldrarættin millum mammu og pápa í Føroyum, fær kvinnan altíð foreldrarættin. Her ræður als ikki javnstøða. Kortini hevur Javnstøðan ongantíð tikið henda spurning upp, vísir Marjus Dam á.

# Eyð og Makrel hittast í finaluni

**Tá klokkan fór av ellivu fríggjamorgunin varð tað greitt, at tveir føroyskir finalistar verða í kappingini Nordic Bands Unsigned. Eyð Berghamar Jakobsen vann mánaðarfinaluna fyri juli við 22% av atkvøðunum framman fyri Shitzoo við 20% og Widescreen Mode við 16%**

TÓNLEIKAKAPPING

Seinasta døgnið tók Eyð seg øðiliga nógv fram eftir listanum, ivaleyst væl hjálpt av føroyskum atkvøðum. Hósmorgunin á miðdegi var Eyð á fjórða plássi við 13% av atkvøðunum, men eftir at portalurin hevði almannakunngjørt fyribilsúrslitið gekk skjótt.

Í finaluni, sum er hesa vikuna, kappast níggju bólkar um ein útgávusáttmála, sum er fyri øll Norðanlond.

Millum sangirnar í finaluni verða sostatt Forever and Beyond hjá Makrel og »You did me wrong« við Eyð Berghamar Jakobsen. Umframt tey eru norsku Molotov, True Confessions og Shitzoo, svensku Jade og Casual Breakdown og finsku Insipid og Widescreen Mode.

Finalan er eitt bland av áhoyraraatkvøðum og dómaraatkvøðum. Áhoyrarnir atkvøða á heimasíðuni www.nordicunsigned.com. Tann, ið fær flestar atkvøður, fær trý stig, tann, sum fær næstflestar atkvøður, fær tvey stig, og tann sum fær triðflestar atkvøður, fær eitt stig.

Dómararnir hava fýra stig og kunnu velja at geva øll stigini til ein bólk ella at býta tey millum fleiri bólkar.

Tann, ið so hevur flest stig, vinnur sáttmálan.

# Rættleiðing

Av misgáum er eitt navn ikki komið við í greinina um føroyavinin Fríðrik Erlings í blaðnum í gjár. Dávid Samuelsson, ið er hálvur føroyingur, er við í felagnum hjá Fríðrikki og er hin helmingurin av tí virksemi, sum teir fáast við – serstakliga á ferðunum í Føroyum. Hann átti sjálvsagt at verið nevndur í greinini. Vit biða lesaran og Fríðrik og Dávid orsaka mistakið
.

**-blðm-**